# Signaliserar nýtt rák

## - Tá TAKS nú boðar frá, at kirkjuskatturin ikki longur er at rokna sum ein skattur, men sum eitt limagjald, so boðar tað frá einum nýggjum ráki, sigur Jógvan Fríðriksson, bispur

Leo Poulsen

Í einari fráboðan í gjár sigur TAKS, at stovnurin hevur endurskoðað tulkingina av lógini um kirkjuskatt. Víst verður til grein 54 í skattalógini, sum sigur, at » samlaða skattaprosentið av eini inntøku ikki skal vera hægri enn 50% (2010 og 2011 tó 52%), og at um samlaði skatturin er omanfyri 50%, so verður skatturin lækkaður niður til 50%. Higartil hevur kirkjuskatturin verið roknaður sum ein partur av samlaða skattaprosentinum, og verið partur av tillagingini av samlaða skattaprosentinum. Við nýggju tulkingini av lógini um kirkjuskatt verður kirkjuskatturin frá 1. januar 2011 ikki roknaður sum ein skattur, men sum eitt limagjald til fólkakirkjuna. Soleiðis kann kirkjuskatturin í útrokningarhøpi framyvir best samanlíknast við onnur føst gjøld so sum barsilsgjaldið, AM-gjaldið o.s.fr.«.

Og sagt verður víðari:

» Nýggja tulkingin av lógini um kirkjuskatt er grundað á, at borgarar kunnu sleppa undan at gjalda kirkjuskatt við at melda seg úr fólkakirkjuni. Galdandi lóg um kirkjuskatt er frá 2008, tá ið kirkjan varð yvirtikin sum føroyskt málsøki, men TAKS hevur avgjørt ikki at gera broytingina galdandi við afturvirkandi kraft, men galdandi frá 1. januar 2011«.

### Neyvan exodus

Jógvan Fríðriksson, bispur sigur, at hetta boðar frá einum nýggjum ráki.

- Eg haldi framvegis at tað er óheppi, at kirkjuligi myndugleikin hvørki var kunnaður framman undan, ella fekk høvi at vera við í kjakinum, sigur Jógvan Fríðriksson.

Hann væntar kortini ikki, at fólk fara at venda kirkjuni bakið av hesari orsøk.

- Eg vænti ikki, at fólk fara at melda seg úr Fólkakirkjuni, hóast hendan broytingin í tulkingini hjá TAKS merkir, at fleiri borgarar fara at gjalda 0,6% meiri í skatti, sigur Jógvan Fríðriksson.

Kirkjuskattaprosentið er eins fyri alt landið og er í dag 0,6%. Harumframt kann staðbundin kirkjuskattur upp til 0,3% áleggjast, til dømis um nýggj kirkja skal byggjast í eini sókn.

Í teimum kommunum, sum hava hetta staðbundnað eyka 0,3% merkir, at hjá teimum borgarunum verður eykaskatturin 0,9%.

Bispur vísir annars til eina viðmerking um, at hendan avgerðin hjá TAKS er byrjanin til skilnaðin millum kirkju og stat.



*Bispur harmast um, at kirkjuligi myndugleikin ikki var við í nýggju tulkingini, men væntar tó ikki, at hetta fer at føra til hópútmeldan úr kirkjuni*

# Anfinn tekur undir við Heðini

## Ivi hevur verið sáddur um, hvørt Heðin Mortensen hevur býráðið aftan fyri seg í SEV-málinum, men nú boðar Anfinn Brekkstein frá, at hann tekur undir við borgarstjóranum

Leo Poulsen

Príshækkanin hjá SEV hevur býtt eigararnar – kommunurnar – upp í tveir bólkar. Í øðrum gongur Heðin Mortensen á odda, og hann fær stuðul frá Anfinn Brekkstein úr andstøðuni í Tórshavnar býráð.

- Heðin Mortensen hevur rætt í, at nú er ikki tíðin at leggja fleiri byrðar á herðarnar á borgarunum, sigur Anfinn Brekkstein.

Hann vísir á, at borgarstjórin hevði eitt konkret uppskot um eina millumloysn við 7,5 oyrum.

- Tað haldi eg, er ein gongd leið. Eg veit væl, at SEV hevur brúk fyri pengunum, men tað kemst av, at teir hava gjørt íløgur, ið ikki svara seg, og haraftrat seti eg spurnartekin við príshækkingina, tí hon verður gjørd fyri at fáa raksturin hjá SEV at svar seg, sigur Anfinn Brekkstein.

Umboðið fyri Sambandsflokkin í býráðnum sigur, at á aðalfundinum álegði eigarin nevndini at fara til hús og endurskoða fíggjarlógaruppskotið, men kortini verður sama uppskot lagt fyri eykaaðalfundin.

- Og tað haldi eg ikki er nóg gott, sigur Anfinn Brekkstein.

Hann helt tað eisini vera ódámligt, at stjórin beint undan atkvøðugreiðsluni »málaði fanan á veggin«.

- Eg metti ikki tað var í lagi, at stjórin reisti seg. Stjórin er ikki yvir nevndini, og tí skuldi tað verið nevndarformaðurin, sum reisti seg og ikki stjórin, sigur Anfinn Brekkstein.

Hann heldur, at mátin tað gekk fyri seg á fundinum í gjár, hevur skotið ein kíla í leiðsluna hjá SEV. Hann gevur heldur ikki nógv fyri visjónirnar hjá SEV um meiri grøna orku.

- Var talan um eina privata fyritøku, so hevði hon ikki gjørt hesar íløgurnar uttan so, at hon hevði ráð til tað. Í hesum førinum er tað eitt mál hjá landinum at minka um $CO_2$ útlátið, og tá liggur tað ikki einsíðis á SEV at náa hetta málið. Har má landið taka sítt tak, sigur Anfinn Brekkstein.

Hann sigur, at trupulleikin er, at SEV er farið út á ein skráplan, har teir íløgufíggja raksturin.

- SEV er komið í svárar fíggjarligar trupulleikar, og tað er har, hundurin er grivin, sigur Anfinn Brekkstein.



*Anfinn Brekkstein stuðlar Heðini Mortensen í sínum atfinningum at SEV*